TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Dagfest 31. januar 2024

Leiðslan

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
100 Tórshavn

Okkara j.nr.
24/00618-4

Málsviðgeri
Maria Thorsteinsson

Tygara j.nr.

Uppskot til løgtingslóg um broyting í Elveitingarlógini

Víst verður til hoyringsskriv frá Umhvørvismálaráðnum dagfest tann 20. desembur 2023 viðvíkjandi "*Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um framleiðslu flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin)*".

Tórshavnar kommuna tekur sum heild undir við, at fjarhitaøkið verður skipað sambært lóg, men elveitingarlógin er ikki rætta stað at regulera fjarhitavirksemi eftir. Kommunan mælir eins og Kommunufelagið tó til, at fjarhitavirksemi verður skipað í serstakari lóg.

Útvega loyvir til verandi og framtíðar fjarhitavirksemi
Í uppskotinum til elveitingarlógina er ásett, at álagt verður fjarhitafelagnum í Tórshavn at útvega sær loyvi til verandi og framtíðar fjarhitavirksemi, eins og øðrum feløgum, felagsskapum ella øðrum, sum antin hava ella fara undir at veita fjarhita.

Fyri tað fyrsta skal viðmerkjast, at ikki er vanligt at lóggeva við afturvirkandi kraft.

Ein grundleggjandi aðalregla innan lóggávu er, at ein tyngjandi lóg einans fær afturvirkandi kraft, um tað er bráðneyðugt. Við bráðneyðugt skal skiljast sum verandi avgerandi atlit, sum seta fram krav um eina lógarbroyting, og at afturvirkandi tíðin skal verða so lítið víðfevnd sum møguligt. Viðmerkjast skal tó eisini, at hugtakið "*avgerandi atlit*" er merkt av politikki, og tískil kunnu ymiskar fatanir verða av hugtakinum.

Prinsippið er grundað á ta almennu áskoðanina um rættartrygd, har ið borgarin frammanundan skal kunna seta seg inn í tær rættarreglur, sum hava týdning fyri teirra atburð, soleiðis at høvi fæst at skipa seg eftir reglunum. Fær ein lóg gildi við afturvirkandi kraft verður rættartrygdin hjá borgarunum eisini heft við einari ávísari óvissu.

Ásetingin um loyvi til verandi fjarhitavirksemi fer at hava við sær eina stóra fyrisitingarliga og fíggjarliga byrðu fyri Fjarhitafelagið, um loyvi skal søkjast fyri alt fjarhitavirksemi, sum hevur verið aftur í tíð. Serliga um útrokningar eftir § 15b skulu gerast fyri alt núverandi fjarhitavirksemi, sum loyvi skal søkjast um.

Eisini kann spurnartekin setast við, hvat hendir við teimum verandi fjarhitaleiðingum, um eitt noktandi loyvi kemur? Skulu so hesir borgararnir ongan hita hava í sínum bústaði, ella skulu tey sjálvi útvega sær egna hitaskipan?

Mælt verður tískil til, at lógaruppskotið nágreinar, hvat avleiðingin verður fyri Fjarhitafelagið og borgarar, um so er at loyvi ikki verður útvegað til verandi fjarhitavirksemi.

Kommunan mælir somuleiðis eisini til, at lógin bert verður galdandi frameftir og ikki við afturvirkandi kraft, og at tað heldur verður skipað soleiðis, at kommunan skal útvega tilfar um verandi fjarhita virksemi.

§ 15a – Partar av fjarhitaveitingini sum avlopsorka og varandi orkukeldur
Í stk. 4 er talan um at áseta hvussu stórur partur av fjarhitaveitingini í minsta lagi skal koma sum avlopshiti frá virkjum og varandi orkukeldum.

Fjarhitaveitarin hevur eina veitingarskyldu, og má tí raðfesta í rakstrinum, at kundarnir fáa nøktandi fjarhitaveiting.

Hvørt man í hesi áseting meinar við mátt ella orkunøgd er týðandi, av tí at veitingin skal kunna tola óhapp og aðrar rakstraravbjóðingar.

§ 15b – Umsókn um loyvi til fjarhitavirksemi
Viðvíkjandi § 15b í uppskotinum skal ein umsókn innihalda nakrar upplýsingar, um loyvi til fjarhitavirksemi skal fáast til vega. Nakrar av hesum eru sera ógreiðar.

Til nr. 3 – samfelagsbúskaparlig greining og meting
Hildið verður, at hesar treytir eru alt ov yvirskipaðar, og tí tilvildarligar. Eingin nágreining hvat ein "*virkis- og samfelagsbúskaparlig greining og meting*" er, og hvat greiningin og metingin byggir á.

Ein vandi kann tískil verða, at ein slík greining og metingin verður tilvildarlig alt eftir hvat embætisfólk viðgerð eina ætlan. Hetta ber ikki til í einum framkomnum rættarsamfelagi.

Nr. 5 – fyrimunir og vansar við fjarhitaskipanini
Hetta sama er galdandi fyri nr. 5), hvussu fyrimunir og vansar verða mettir, og út frá hvørjum treytum, har einki er upplýst um hesi viðurskiftir,

Ein betri og nágreina áseting má vera, soleiðis at ivaspurningar ikki eru.

Nr. 6 – Íbindingarskylda

Her verður ásett, at spurningurin íbindingarskyldu skal síggjast aftur í prísásetingini, og um brúkarin verður bundin av einari fjarhitaskipan uttan møguleika til sjálvur at velja aðra orkuskipan, sum møguliga er bíligari og meira umhvørvisliga burðardygg.

Her eigur spurnartekin at verða sett til viðmerkingina, um tað gagnliga í eini heildarskipan í mun til eitt "pop up" tilboð frá einum veitara til ein ávísan brúkara. Tað ber ikki til at leggja fjarhitaleiðingar við livitíð uppá 40-60 ár undir tílíkum treytum. Fær ein borgari eitt tilboð uppá eina hitapumpu, so eigur sum minstamark alt at verða "benchmarka", bæði livitíð, dálking, burturbeining o.s.fr.

Viðmerkjast skal eisini, at allar felags orkuveitingar, sum krevja stórar íløgur, mugu tryggjast við at brúkarin bindir seg at nýta skipanina í eitt ávíst áramál, eisini hóast ein bíligari loysnin kann koma fram seinni. Hetta er ein treyt fyri at kunna fíggja íløguna.

Eisini er tað soleiðis, at um brúkarin seinni kann velja eina aðra bíligari loysn, so verður tað dýrari fyri tey sum eru eftir og so er grundalagið fyri skipanini burtur.

§ 15c - Treytir í loyvi til fjarhitavirksemi

§ 15c, stk. 1 burdi eisini innihildið ásetingar um back-up, vísandi til veitingartrygdina mótvegis kundum.

§ 15, stk. 2 í lógaruppskotinum hevur hesa orðing:

> "(…)
>
> Landsstýrisfólkið kann í avgerð ella í kunngerð áseta treytir og reglur um, hvussu prísir skulu roknast, prísáseting fyri íbinding og hitaveitingar, viðskiftatreytir, ómaksgjøld, upplýsingarskyldu mótvegis kundum og landsstýrisfólkinum, gerð av serstøkum roknskapi, upplýsing um útlát av vakstrarhúsgassi o.tíl.
>
> (…)"

Gerast skal vart við, at hendan ásetingin er so umfatandi, at hetta eigur bara at verða gjørt við kunngerð, soleiðis at kommunan og onnur fáa møguleika at gera viðmerkingar, áðrenn treytir og reglur verða settar í verk.

Vinaliga
k.v.

Heðin Mortensen
borgarstjóri

/Jóan Pétur Hentze
kommunustjóri